tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 2019-04 |
| Fundardagur | 13. marts 2019 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Møtt: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Bjarni Hammer, Bogi Johannesen, Súsanna Bertholdsen og Kristina Roest.
Skrivari: Jónleyg J. Bech

## Yvirlit yvir mál til viðgerðar


| Pkt. | Tekstur | Síða |
|---|---|---|
| 1 | Skattainntøkur 2019 | 2 |
| 2 | Uppskot til broyting í starvsfólkaskipan fyri Tvøroyrar Kommunu | 2 |
| 3 | Roknskapur fyri Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn 2018 | 3 |
| 4 | Staðseting av nýggjum skúla | 4 |
| 5 | Eftirskúli í Suðuroy | 4 |
| 6 | Løgur á skúlaøkinum - eykajáttan | 5 |
| 7 | Umsókn um stuðul í 2019 - Tvøroyrar Bóltfelag | 5 |
| 8 | Íbúðarbygging Heiðatrøðin 2 - Bústaðir - matr. nr. 208av | 8 |
| 9 | FSR - bygging av nýggjum neysti | 9 |
| 10 | Umhvørvisvikan 2019 | 12 |




Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| Fundur nummar | 2019-04 |
|---|---|
| Fundardagur | 13. marts 2019 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Ongin viðmerking var til fundarskránna.

**25.20.00-Ø00-1-19**

## 1. Skattainntøkur 2019

### Málsfrágreiðing

**Fíggjarnevndin, 7. marts 2019, pkt. 1:**
Borgarstjórin kunnar um skattainntøkurnar fyri februar og fyri árið sum heild.

### Avgerð

Borgarstjórin kunnar um skattainntøkurnar í februar og fyri árið sum heild.

### Skjøl

- Skattur 2019.xlsx
- Samanbering av skatti 2018-2019.xlsx

**00.15.00-A21-1-09**

## 2. Uppskot til broyting í starvsfólkaskipan fyri Tvøroyrar Kommunu

### Samandráttur

Í uppskotinum til broytingar í starvsfólkaskipanini fyri Tvøroyrar Kommunu eru pkt. 5 viðv. sjúkrafráveru, pkt. 6 viðv. aðrari fráveru og pkt. 16 viðv. sosialum miðlum løgd afturat galdandi starvsfólkaskipan.

### Málsfrágreiðing

**Býráðið, 3. december 2018, pkt. 19:**

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 2019-04 |
| Fundardagur | 13. marts 2019 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

1. viðger av broyting í starvsfólkaskipanini:

Broytingar einmælt samtyktar við 1. viðgerð.

**Avgerð**

2. viðgerð av broyting í starvsfólkaskipanini:

Kristina Roest mælir til at beina málið í fíggjarnevndina. 4 atkvøður fyri, 3 atkvøður ímóti. Kristina Roest, Bjarni Hammer, Bogi Johannesen og Súsanna Bertholdsen atkvøddu fyri, Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir og Alvi Mortensen atkvøddu ímóti. Tilmælið samtykt.

**Skjøl**

- Uppskot til broyting í starvsfólkaskipan2
- dagførd og góðkend starvsfólkaskipan 10.09.2018

**19.03.00-I04-1-19**

## 3. Roknskapur fyri Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn 2018

### Málsfrágreiðing

**Mentanarnevndin, 4. marts 2019, pkt. 4:**
Forkvinnan kunnar nevndina um roknskapin hjá Tvøroyrar Bygda- og Sjósavni fyri 2018.

**Fíggjarnevndin, 7. marts 2019, pkt. 3:**
Nevndin verður kunnað um roknskapin hjá Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinunsavni fyri 2018.

**Avgerð**

Borgarstjórin kunnar um roknskapin hjá Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavni fyri 2018.

**Skjøl**

- Roknskapur fyri Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn 2018



Formansváttan

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 2019-04 |
| Fundardagur | 13. marts 2019 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**20.30.00-A00-1-18**

## 4. Staðseting av nýggjum skúla

### Málsfrágreiðing

**Mentanarnevndin, 4. marts 2019, pkt. 8:**
Nevndin mælir til, at nýggi skúlin verður staðsettur úti á Tværoyri, har Tværoyrar Skúli er. Tilmælið er grundað á, at nevndin metir tað vera av sera stórum týdning fyri trivnaðin í býnum, at børn og ung eru ein partur av býarmyndini.

**Fíggjarnevndin, 7. marts 2019, pkt. 4:**
Kristin Michelsen og Kristina Roest taka støðu til málið, tá ið tað verður lagt fyri býráðið.

### Avgerð

Kristina Roest mælir til at staðseta nýggja skúlan í Trongisvági.

Atkvøðugreiðsla um tilmælið frá mentanarnevndini um at staðseta nýggjan skúla úti á Tværoyri, har Tværoyrar Skúli er í dag: 6 atkvøður fyri, ein atkvøða ímóti. Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Bjarni Hammer, Bogi Johannesen og Súsanna Bertholdsen atkvøddu fyri, Kristina Roest atkvøddi ímóti. Tilmælið samtykt.

**17.11.00-P00-1-15**

## 5. Eftirskúli í Suðuroy

### Málsfrágreiðing

### Avgerð

Einmælt samtykt at viðgera málið sum lukkað mál eftir umbøn frá Bjarna Hammer.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| Fundur nummar | 2019-04 |
|---|---|
| Fundardagur | 13. marts 2019 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**00.30.18-S00-1-19**

## 6. Løgur á skúlaøkinum - eykajáttan

### Málsfrágreiðing

Forkvinnan ynskir at umrøða møguleikan at flyta løgujáttanina til gólvið í skúlagarðinum í Trongisvági til løgujáttanina til lærarastovurnar.

**Mentanarnevndin, 4. marts 2019, pkt. 10:**
Nevndin mælir til, at báðar lærarastovnurnar verða nútímansgjørdar, tó við atliti til, at nýggjur skúli skal byggjast.

Nevndin mælir til at flyta kr. 600.000,- frá løgujáttanini til gólvið í skúlagarðinum í Trongisvági til løgujáttanina til lærarastovurnar.

**Fíggjarnevndin, 7. marts 2019, pkt. 6:**
Nevndin mælir til at útseta málið til støða er tikin til staðseting av skúlanum.

### Fígging

Talan er um útreiðsluneutrala eykajáttan - at flyta kr. 600.000,- frá løgujáttanini til gólvið í skúlagarðinum í Trongisvági til løgujáttanina til lærarastovurnar.

### Avgerð

1. viðgerð av eykajáttan á fólkaskúlaøkinum:

Atkvøðugreiðsla um at flyta kr. 600.000,- frá løgujáttanini til gólvið í skúlagarðinum í Trongisvági til løgujáttanina til lærarastovurnar: Eykajáttan einmælt samtykt við 1. viðgerð.

**18.20.00-Ø40-7-18**

## 7. Umsókn um stuðul í 2019 - Tvøroyrar Bóltfelag

### Málsfrágreiðing

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 2019-04 |
| Fundardagur | 13. marts 2019 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Mentanarnevndin, 8. januar 2019, pkt. 5:**
Nevndin ynskir ein fund millum býráðið og nevndina í TB. Málið verður útsett til hesin fundur hevur verið.

**Mentanarnevndin, 4. februar 2019, pkt. 11:**
Nevndin mælir til, at stuðla við somu játtan sum í fjør kr. 300.000,-

Bjarni Hammer mælir til, at umframt hetta verður stuðlað við kr. 30.000,- um mánaðin. Hesin stuðul verður at eftirmeta 3. hvønn mðr ella oftari, um tørvur er á tí.

Anita Vibergsdóttir ynskir viðmerkt, at hon heldur kommunan skal heita á nevndina at gera eina stuðulsinnsavning millum fólk í kommununi.

Nevndin ynskir, at býráðið viðger málið sum afturlatið mál.

**Fíggjarnevndin, 7. februar 2019, pkt. 8:**
Borgarstjórin mælir til, at kommunan stuðlar TB við kr. 500.000,- og at stuðulin verður goldin í mánaðarligum gjøldum yvir 10 mánaðir.

Bjarni Hammer mælir til at stuðla við somu játtan sum í fjør kr. 300.000,- Eisini mælir hann til, at umframt hetta verður stuðlað við kr. 30.000,- um mánaðin fram til kappingin í 2019 endar. Hesin stuðul verður at eftirmeta 3. hvønn mðr ella oftari, um tørvur er á tí.

Kristina Roest tekur undir við tilmælinum frá mentanarnevndini at stuðla við somu játtan sum í fjør kr. 300.000,-

**Býráðið, 13. februar 2019, pkt. 3:**
Atkvøtt varð um tilmælið frá mentanarnevndini.
Súsanna Bertholdsen og Kristina Roest atkvøddi fyri.
Kristin Michelsen, Alvi Mortensen, Bjarni Hammer og Bogi Johannesen atkvøddi ímóti.

Atkvøtt varð um tilmælið frá Kristin Michelsen í fíggjarnevndini.
Kristin Michelsen, Alvi Mortensen atkvøddi fyri.
Súsanna Bertholdsen og Kristina Roest, Bjarni Hammer og Bogi Johannesen atkvøddi ímóti.

Atkvøtt varð um tilmælið frá Bjarna Hammer og Kristinu Roest úr fíggjarnevndini.
Bjarni Hammer og Bogi Johannesen atkvøddi fyri.
Kristin Michelsen, Alvi Mortensen atkvøddi ímóti.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 2019-04 |
| Fundardagur | 13. marts 2019 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Súsanna Bertholdsen og Kristina Roest atkvøddi ikki.

Málið er fallið.

**Býráðið, 1. marts 2019, pkt. 1:**
Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir og Alvi Mortensen mæla til at stuðla TB við kr. 500.000,-, og at stuðulin verður goldin í mánaðarligum gjøldum yvir 10 mánaðir.

Kristina Roest, Súsanna Bertholdsen, Bjarni Hammer og Bogi Johannesen mæla til, at málið verður viðgjørt aftur í mentanarnevndini.

Atkvøðugreiðsla um tilmælið frá Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir og Alvi Mortensen: 3 atkvøður fyri, 4 atkvøður ímóti. Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir og Alvi Mortensen atkvøddu fyri, Kristina Roest, Súsanna Bertholdsen, Bjarni Hammer og Bogi Johannesen atkvøddu ímóti. Tilmælið fallið.

Atkvøðugreiðsla um tilmælið frá Kristina Roest, Súsanna Bertholdsen, Bjarni Hammer og Bogi Johannesen : 4 atkvøður fyri, 3 atkvøður ímóti. Kristina Roest, Súsanna Bertholdsen, Bjarni Hammer og Bogi Johannesen atkvøddu fyri, Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir og Alvi Mortensen atkvøddu ímóti. Tilmælið samtykt.

**Mentanarnevndin, 4. marts 2019, pkt. 11:**
Súsanna Bertholdsen mælir til at stuðla við kr. 300.000,- her og nú, umframt kr. 20.000,- um mánaðin frá 1. apríl og árið út. Bjarni Hammer tekur undir við tilmælinum hjá Súsonnu Bertholdsen.

Anita Vibergsdóttir mælir til at stuðla við kr. 500.000,-.

**Fíggjarnevndin, 7. marts 2019, pkt. 7:**
Borgarstjórin mælir til at stuðla við kr. 500.000,-, ið verður útgoldið í mánaðarligum gjøldum.

## Avgerð

Atkvøðugreiðsla um tilmælið frá Súsonnu Bertholdsen um at stuðla TB við kr. 300.000,- her og nú, umframt kr. 20.000,- um mánaðin frá 1. apríl og árið út: 4 atkvøður fyri, ongin atkvøða ímóti. Bjarni Hammer, Bogi Johannesen, Súsanna Bertholdsen og Kristina ROest atkvøddu fyri, Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir og Alvi Mortensen atkvøddu ikki. Tilmælið samtykt.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| Fundur nummar | 2019-04 |
|---|---|
| Fundardagur | 13. marts 2019 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**16.15.00-I06-1-12**

## 8. Íbúðarbygging Heiðatrøðin 2 - Bústaðir - matr. nr. 208av

### Málsfrágreiðing

**Tekniska deild mælir til, 4. februar 2019, pkt. 1:**
Kristin Michelsen, borgarstjóri, og Jónleyg Bech, kommunustjóri, vitjaðu nevndina, og kunnaði um málið viðv. samskiftinum við Bústøðum í sambandi við íbúðarbygging í Heiðatrøðini.

Bústaðir ynskir, at fáa longt freistina í ognarbrævinum frá 2013, ið var, at har skuldi byggjast innan 2 ár.
Eisini sigur Bústaðir, at fyri hvørja eind ið kommunan ger byggibúgvin, verður endurgoldið kr. 100.000, tá frároknað keypsprísin.
Tvs. verða 11 eindir gjørdar byggibúgvin, verður goldið 1,1 mill. kr., frároknað 250.000 kr.

Borgarstjórin kunnaði um, at Bústaðir kann byrja beinanvegin.

**Tekniska nevnd, 4. februar 2019, pkt. 1:**
Nevndin mælir til, at lata upp fyri 2 ára klausulinum, og at umsitingin arbeiðir skjótt saman við Bústaðir, við atliti til lendisarbeiði.
Umsitingin vendir aftur til nevndina tá okkurt nýtt er í málinum.

**Býráðið, 13. februar 2019, pkt. 7:**
Einmælt samtykt, at lata upp fyri gamla 2 ára klausulinum, og at 2 ára klausul verður galdandi frá d.d..

**Fíggjarnevndin, 7. marts 2019, pkt. 11:**
Nevndin ynskir at vita, hvør kostnaðurin verður, um kommunan letur grót (borar, spreingir og koyrir á staðið) - ella ávísir Bústaðir eitt øki at bora grót, hvør kostnaðurin verður, um kommunan skal grava út og planera. Heitt verður á teknisku deild um at hava hesar upplýsingar klárar til komandi býráðsfund.

### Avgerð

Borgarstjórin mælir til at parturin hjá kommununi luttekur í verkætlanini við kr. 450.000,-, ið svarar til endurgjaldið frá Bústøðum, tá keypsprísurin er trektur frá. Tilmælið einmælt samtykt.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| Fundur nummar | 2019-04 |
|---|---|
| Fundardagur | 13. marts 2019 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Skjøl**

- Fwd: Heiðatrøðin 2
- Ognarbræv

**18.20.00-G01-1-18**

## 9. FSR - bygging av nýggjum neysti

### Málsfrágreiðing

**Vinnu- og havnanevnd, 31. januar 2019, pkt. 3:**
Alvi Mortensen mælir til, at lata FSR fara í gongd, og játta kr. 500.000.
Bogi Johannesen mælir til, at málið verður viðgjørt í øðrum nevndum, m.a. í Teknisku nevnd, 4. februar 2019.

Samtykt við tveimum atkvøðum, at beina málið í Teknisku nevnd og í Mentarnarnevndina. Alvi Mortensen atkvøddi ímóti.

**Tekniska nevnd, 4. februar 2019, pkt. 6:**
Bjarni Hammer og Kristina Roest mæla til, at heita á FSR-nevndina um at lata inn fullfíggjaðan roknskap fyri 2017 og 2018. Tvøroyrar Kommuna verður partur av einari byggiætlan.
Í sambandi við fundarfrásøgnini frá 26. nov. 2018, hvar heit verður á býráðið um at taka fund upp við Varðan Pelagic, í samband við nýgerð av kappróðrarneysti, verður heit á borgarstjóranum at fáa fundin í lag.

Alvi Mortensen mælir til, at lata FSR fara í gongd, og játta kr. 500.000.

Atkvøtt var um uppskotið hjá Alva Mortensen, og uppskotið fall við 1 atkvøða fyri og 2 í móti.

Atkvøtt var um uppskotið hjá Bjarna Hammer og Kristina Roest, og uppskotið varð samtykt við 2 atkvøðum fyri. Alvi Mortensen atkvøddi ikki.

**Mentanarnevndin, 4. februar 2019, pkt. 12:**
Mælt verður til, at arbeiðið við projektinum verður skipað á slíkan hátt, at kommunan hevur neyvt eftirlit og stýring við arbeiðnum.



Formansváttan

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 2019-04 |
| Fundardagur | 13. marts 2019 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Fíggjarnevndin, 7. februar 2019, pkt. 9:**
Borgarstjórin mælir til, FSR letur kommununi roknskap fyri 2017 og 2018 og síðan fær kr. 500.000,- til at byrja arbeiðið at byggja nýtt neyst. Hann mælir eisini til, at tekniska deild og/ella fíggjarumsitingin hjá kommununi verða umboðaði í einari bygginevnd fyri verkætlanina.

Bjarni Hammer og Kristina Roest taka undir við tilmælunum frá teknisku nevnd og mentanarnevndini. Bjarni Hammer mælir til, at býráðið hevur umboð í bygginevndini fyri verkætlanini.

Bjarni Hammer mælir til, at kommunan verður eigari av hølunum, men at FSR fær fullan ræðisrætt yvir teimum.

**Býráðið, 13. februar 2019, pkt. 4:**
Býráðið hevur umbiðið skjøl frá FSR, sum ikki eru til taks, og tískil verður málið ikki viðgjørt nú.

**Býráðið, 1. marts 2019, pkt. 2:**
Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir og Alvi Mortensen mæla til at stuðla FSR við kr. 500.000,-, ið er samtykt í fíggjarætlanini fyri 2019, til at byggja nýtt neyst ella renovera verandi neyst, og at ein trímanna bygginevnd verður vald við tveimum umboðum frá FSR og einum umboði frá Tvøroyrar Kommunu.

Kristina Roest, Súsanna Bertholdsen, Bjarni Hammer og Bogi Johannesen mæla til, at málið verður beint í teknisku nevnd, har tað er á skrá komandi mánadag.

Atkvøðugreiðsla um tilmælið frá Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir og Alvi Mortensen: 3 atkvøður fyri, 4 atkvøður ímóti. Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir og Alvi Mortensen atkvøddu fyri, Kristina Roest, Súsanna Bertholdsen, Bjarni Hammer og Bogi Johannesen atkvøddu ímóti. Tilmælið fallið.

Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir og Alvi Mortensen ynskja viðmerkt, at tað undrar tey, at býráðið hevur einmælt samtykt fíggjarætlanina, har kr. 500.000,- eru settar av til kappróðrarneyst, og at býráðið hevur einmælt samtykt at taka undir við tilmæli frá havnanevndini um eitt øki til FSR á Hvítanesi, og nú hevur málið fingið aðra vend og skal viðgerast í teknisku nevnd uttan at umsókn um byggiloyvi fyriliggur.

Bjarni Hammer ynskir viðmerkt, at hann undrast á, hvar ynski um at renovera verandi neyst, er komið frá.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| Fundur nummar | 2019-04 |
|---|---|
| Fundardagur | 13. marts 2019 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Kristina Roest, Súsanna Bertholdsen, Bjarni Hammer og Bogi Johannesen ynskir viðmerkt, at býráðið hevur samtykt at seta pening av til nýtt neyst, tí meta tey tað ikki vera undrunarvert, at málið fær viðgerð í teknisku nevnd.

Atkvøðugreiðsla um tilmælið frá Kristina Roest, Súsanna Bertholdsen, Bjarni Hammer og Bogi Johannesen: 4 atkvøður fyri, 3 atkvøður ímóti. Kristina Roest, Súsanna Bertholdsen, Bjarni Hammer og Bogi Johannesen atkvøddu fyri, Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir og Alvi Mortensen atkvøddu ímóti. Tilmælið samtykt.

**Tekniska nevnd, 4. marts 2019, pkt. 4:**
FSR hevur biðið um innlit í byggiloyvinum hjá VP, í mun til at fylla út eystureftir, men heldur seg ongantíð hava fingið nakað svar.

Heitt verður á nýggja nevndina í FSR, um at taka støðu til, um FSR skal standa sum byggiharri av kappróðrarneystinum.

**Fíggjarnevndin, 7. marts 2019, pkt. 10:**
Heitt verður á nýggju nevndina í FSR, um at taka støðu til, um FSR skal standa sum byggiharri av kappróðrarneystinum, áðrenn komandi býráðsfund.

## Avgerð

Einmælt samtykt, at FSR fær játtanina á 500.000,- til at byrja verkætlanina við nýggjum neysti.

## Skjøl

- Teldupostur frá FSR
- FSR roknskapur 2017.pdf
- FSR roknskapur 2018.pdf
- Tvøroyrar Kommuna.docx

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 2019-04 |
| Fundardagur | 13. marts 2019 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**09.00.00-4-17**

## 10. Umhvørvisvikan 2019

### Málsfrágreiðing

**Trivnaðar- og umhvørvisnevnd, 4. marts 2019, pkt. 1:**
Umhvørvisvikan verður 10.-16. juni 2019.

Hugskot kunnu annars sendast til Bjarna Nygaard og Lasse Jensen.

### Avgerð

Bjarni Hammer kunnar býráðið um, at umhvørvisvikan verður í viku 24.

### Skjøl

- Fwd: Umhvørvisvikan



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 2019-04 |
| Fundardagur | 13. marts 2019 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Bók lisin** **Fundur lokin**

Kristin Michelsen:______________

Bjarni Hammer:______________

Anita Vibergsdóttir:______________

Bogi Johannesen:______________

Alvi Mortensen:______________

Kristina Roest:______________

Súsanna Bertholdsen:______________